Starv í umsitingini í KT-fyrisitingini á Gjaldstovuni

Nú KT-fyrisitingin økir um virksemið, verður søkt eftir fólki at standa fyri umsitingarligu uppgávunum hjá deildini.

Arbeiðsuppgávurnar eru í høvuðsheitum:
- halda yvirlit yvir og avgreiða gjøld og rokningar hjá stovnunum fyri tænasturnar frá KT-fyrisitingini
- umsita yvirlit yvir stovnar og brúkarar í Landsneti
- umsita tænastusáttmálar millum stovnarnar og KT-fyrisitingina
- hava um hendi samskiftið millum KT-fyrisitingina og stovnarnar, bæði umvegis teldupost og við tilfari, sum verður lagt út á heimasíðuni hjá KT-fyrisitingini
- hava um hendi bókhaldið hjá KT-fyrisitingini
- standa fyri journaliseringini

Talan kann eisini verða um aðrar umsitingarligar uppgávur fyri KT-fyrisitingina.

Krøv til starvið:
Tú skalt í minsta lagi hava miðnámsskúlaútbúgving og/ella viðkomandi arbeiðsroyndir. Tað týdningarmesta er, at tú hevur góð umsitingarlig evni, dugir væl at orða teg skrivliga, skilir bókhald, hevur góð evni at skipa gerandisdagin, og hevur lætt við at hava yvirlit. Tú skalt bæði kunna arbeiða sjálvstøðugt og kunna samstarva við onnur. Liggur væl fyri hjá tær at arbeiða við kt, er tað ein fyrimunur.

KT-fyrisitingin bjóðar, sum partur av Gjaldstovuni, spennandi arbeiðsumhvørvi, har fakliga stigið er í støðugum framburði, og har framkomnir arbeiðskarmar og –amboð verða brúkt.

Setanarviðurskifti:
Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna. Starvið er sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvið er flokkað í 3. lønarflokki. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Nicolai M. Balle, deildarstjóra í KT-fyrisitingini, sum er at hitta á tlf. 792424 ella umvegis teldupost adressu nicolai.balle@gjaldstovan.fo

Gjaldstovan hevur heimasíðuna www.gjaldstovan.fo
KT-fyrisitingin hevur heimasíðuna www.ktf.fo

Umsókn:
Umsókn við prógvum og møguliga viðmælum skal verða send Gjaldstovuni, Traðagøtu 39, Boks 2009, 165 Argir.

Umsóknarfreistin er 26. november í 2009.

Um Gjaldstovuna:
Gjaldstovan er skipað í fýra høvuðsøki:
- Lønardepilin (lønarskipan, lønarbókhald, ráðgeving og leiðslukunning)
- Roknskapardeild (yvirskipaðar roknskapar-uppgávur, bókhald, gjaldingar og leiðslukunning)
- Kervisfyrisiting (rekur búskaparskipan landsins)
- KT-fyrisiting

KT-fyrisitingin hevur uppgávuna at samskipa og miðsavna KT hjá landsfyrisitingini. Ein av tænastunum, sum KT-fyrisitingin bjóðar almennu stovnunum, er Landsnet, sum er felags kt-undirstøðukervi, sum allir almennir stovnar kunnu vera partur av. Í løtuni eru 23 stovnar og meira enn 600 brúkarar, sum brúka Landsnet tænastuna.

www.gjaldstovan.fo

DIMMALÆTTING 541200

Bót fyri medisinkoyring

Ein maður, sum varð tikin tvær ferðir at koyra bil ávirkaður av heilivági, missir koyrikortið í hálvt annað ár og skal gjalda 2000 krónur í bót

FØROYA RÆTTUR
Randi Jacobsen
randi@sosialurin.fo

Ein 58 ára gamal hevur í Føroya rætti fingið 2000 krónur í bót og at missa koyrikortið í hálvt annað ár.

Revsingin er bbæði fyri at hava koyrt ávirkaður av rúsdrekka og fyri skilaleysa koyring.

Maðurin varð fyrru ferð meldaður av einum, sum helt mannin vera ávirkaðan, sum hanhn koyrdi. Tá ið maðurin varð tikin, var hann so ávirkaður, at hann lá fram á rættið.

Áðrenn tað málið kom fyri rættin, varð maðurin aftur tikin, og ta ferðina var hann eisini ógvuliga ávirkaður. Hann hevði tikið bæði heilivág til at sova av og so kodimagnyl, sum hann var bundin av.

Ákærin helt tað vera herðandi umstøður, at maðurin varð tikin tvær ferðir, og hon kravdi í fyrsta lagi, at hann varð dømdur at missa koyrikortið í fýra ár.

Men dómarin helt, at hóskandi revsing var at missa koyrikortið í hálvt annað ár.

Tað eydnaðist ikki at fáa at vita, um maðurin og ákæruvaldið hava góðtikið dómin, ella annar parturin hevur kært til landsrættin.

Lýst verður eftir

familjum og dagstovnum til granskingarverkætlan um føroyska barnauppaling

Eingin hevur fyrr kannað, hvussu børn vera ald upp í Føroyum, ella hvussu børn vera førd inn í vaksnamannalívið, og hvussu tey fáa ein sess sum borgari í tí føroyska samfelagnum.

Uttan um okkum halda fólk ofta, at vit eru sum tey sjálvi eru, og vera tey tí bilsin og ørkymlað, tá ið tey síggja nakað annað.

Nú er granskingarverkætlan sett í verk at fáa innlit í, hvussu barnauppaling fer fram í Føroyum.

Tí ynski eg at finna 6 familjur og 3 dagstovnar har:
- familjurnar hava so tætt tilknýti til Føroyar sum til ber.
- familjurnar eru ein vanligur partur av lívinum í nærumhvørvinum.

Hetta merkir:
- at um foreldrini hava útbúgving, skal útbúgvingin helst vera farin fram, meðan tey hava búð í Føroyum.
- at tætt tilknýti er at vanligari føroyskari mentan.
- fáar uttanlandsferðir.

Um foreldrini hava arbeiði aðrastaðni enn á heimstaðnum, skal hetta helst ikki vera longur burturi enn í næstu bygd ella býi.

Best er, um allar familjurnar hava fleiri børn, har í minsta lagi tvey teirra eru millum eitt ár og upp til skúlaaldur.

- 4 familjur skulu helst búgva í lítlari bygd ella smærri bygdum við so lítlari tilflyting, sum til ber.
- 2 familjur skulu helst búgva í bygdum, sum ikki hava dagstovn.
- 2 familjur skulu helst búgva í bygdum, har børnini ganga í dagstovn.
- 2 familjur skulu helst búgva í býi ella stórari bygd, har børnini ganga í dagstovn.

Dagstovnar, talan kann verða um, eru tengdir at teimum familjum, ið vilja vera við í kanningini, og verða teir á sama hátt spurdir, um teir vilja luttaka.

Øll fáa gjølla frágreiðing um verkætlanina og um, hvør teirra leiklutur verður í hesum sambandi.

Um tit hava hug at luttaka í hesi fyrstu verkætlan av sínum slag ella kenna fólk, ið tit halda, høvdu verið tey røttu at havt við, hevði eg verið takksom fyri at frætt frá tykkum.

Turid Olsen
teldupost: turido@ruc.dk · telefon: +45 28220846

Sosialurin 341800



Tel. 21 73 66 & 50 82 34
steinbjorn@dali.fo

RÁÐGEVING & TÆNASTUR til virkisleiðslur innan:

- Fíggjarstýring
- Rakstrarætlan
- Bókhald og MVG-uppgerð
- Prosjektleiðslu
- Marknaðarkanningar
- Kundakanningar

Vit hava meira enn 30 ára royndir innan tær tænastur vit bjóða, bæði frá privata vinnulívinum og tí almenna sektorinum

DALI Consulting Sp/f